Grønlendska Nunaoil fyrimynd hjá føroyingum:

Føroyingar eiga at hava egið oljufelag

Vandi kann verða fyri, at tú kemur at sita úti á síðulinjuni og hyggja at hevur tú ikki títt egna nationala oljufelag. Við einum almennum føroyskum oljufelag, hevur tú nógv betrur innlit í tað, sum oljuídnaðurin fæst við. Tú verður tá við í øllum lisensum og vil tá hava ávirkan á allar avgerðir, sum tiknar verða sigur Morten Larsen, leiðandi geofysikari hjá grønlendska Nunaoil, sum er í Føroyum, nú Thetis ger kanningar her

Jan Müller

Nunaoil er tað almenna grønlendska felagið, sum hevur til end amál at leita eftir olju, gassi og mineralum í Grønlandi. Danski staturin eigur helvtina av felagnum, og grønlendska heimastýrið hina helvtina.

Henda skipan er í tráð við ta avtalu, sum er gjørd millum Grønland og Danmark um helvtarbýti av inntøkunum frá ráevnunum í undirgrundini.

Morten Larsen, leiðandi geofysikari hjá Nunaoil og við ábyrgd fyri seismisku kanningunum heldur tað vera til stóran fyrimun fyri bæði Danmark og Grønland, at tað finst eitt slíkt felag sum Nunaoil.

Eitt av endamálunum við hesum felag er at tryggja, at tú við einum grønlendskum/donskum felag í kann vera við í øllum teimum lisensum, sum verða í grønlendskum øki.

Hetta verður gjørt á tann hátt, at Nunaoil skal einki gjalda til landið, áðrenn eitt fund er gjørt. Hini feløgini í einum útbjóðingarloyvi skulu gjalda fyri kanningar, men tá eitt fund verður gjørt kemur Nunaoil at eiga ein part, sum verður millum 15 til 20% og í sjálvari útbyggingini av einum felti skal Nunaoil vera við til at gjalda sín part av útreiðslunum.

Skapa áhuga fyri oljuleiting

Nunaoil hevur so eisini til endamál at økja um áhugan fyri at fáa í gongd leiting í Grønlandi. Hetta verður m.a. gjørt við at Nunaoil fyri egna rokning savnar inn seismikktilfar og finnur fram til áhugaverd øki. Nunaoil roynir so eisini at tosa við oljufeløgini fyri at sannføra tey um, at tað er áhugavert at gera íløgur í oljuleiting við Grønland.

Nýliga hevur Nunaoil eisini verið sera heppið í síni leiting. Seismiskar kanningar hava víst teimum á eitt stórt gassfund umleið 200 kilometrar vestan fyri Nuuk.

-Vit vóna, at hetta er eitt av heimsins størstu náttúrgassfeltum. Í hvussu er er sera stórur áhugi fyri tí millum oljufeløg. Fimm oljufeløg hava søkt um loyvi at bora. Í løtuni eru samráðingar við feløgini. Roknað verður við fyrstu boringini á sumri 1998.

Eisini aðrastaðni í Grønlandi hava teir góðar vónir. Í Luqsuaq í Vesturgrønlandi hava teir uppdagað, at olja lekur upp úr undirgrundini.

Her borar eitt oljufelag í løtuni fyri at vita, at olja finst í so stórum nøgdum, at hon kann takast upp.

Morten Larsen sigur, at viðurskiftini í Grønlandi og Føroyum nógva staðni eru meinlík, við nógvum basalti.


Hann vónar, at teir í samarbeiðinum við Western á føroyskum øki kunnu fáa royndir og vitan, sum kunnu vera teimum til hjálpar í leitingini eftir olju og gassi við Grønland.

Nunaoil eisini uttanfyri Grønland

Uppá fyrispurning um møguleiki er fyri, at eitt felag sum Nunaoil kann vera við í oljuleitingini við Føroyar sigur Morten Larsen, at hetta er møguligt uppá longri sikt.

-Vit hava fingið loyvi frá politiskari síðu at arbeiða uttan fyri Grønland, men í løtuni hava vit ikki fíggjarligar møguleikar fyri tí.

Fáa vit inntøkur frá fundum í Grønlandi, so er tað ikki óhugsandi, at vit fara at umhugsa at vera við í oljuleiting aðrastaðni.



Nunaoil heldur seg hava fannið heimsins higartil størsta gassfelt í Grønlandi. Her hyggja Johan Mortensen, nevndarlimur í Føroya Oljuídnaði og Morten Larsen, leiðandi geofysikari hjá Nunaoil eftir seismiska kortinum, sum vísir nýggja feltið. Mynd jan

Tryggari við føroyskum oljufelag

Hvat heldur Morten Larsen um tankan við einum almennum føroyskum oljufelag eins og Nunaoil?

-Mín meting er tann, at við einum oljufelag, sum tað almenna eigur, hevur tú nógv betri innlit í tað, sum oljuídnaðurin tekst við.

Tú verður tá við í øllum lisensum og vil tá hava ávirkan á allar avgerðir, sum tiknar verða.

Men ikki minst fer tað at tryggja tí almenna ein part av inntøkunum, sum koma uppá longri sikt í sambandi við eitt fund.

Velur tú ikki at vera við á henda hátt, so kann tað henda, at myndugleikarnir koma at sita úti á síðulinjuni og verða avmarkaðir til bara at fáa sínar inntøkur frá Royalties og skatti.

Morten Larsen heldur, at føroyingar hava møguleika fyri at stovna eitt felag av sama slag sum Nunaoil tó uttan at danski staturin er við.

Tað finnast í Danmark og aðrastaðni í verðini fólk við útbúgving og royndum, sum kunnu brúkast í tí sambandi.

Avgerandi er at byggja upp ein tekniskan stab av fólki, sum hava innlit og royndir bæði í sambandi við seismikk og oljuleiting, men ikki minst í samband

→



Tveir av Westernmonnunum, sum skulu vera umborð á Thetis, meðan seismisku kanningarnar verða gjørdar við Føroyar. Mynd jan

fyri fimm ár í senn.

Nunaoil hevur gjørt íløgur fyri 25-30 mill. kr. í útgerð, sum er sett upp umborð á Thetis.

Danski staturin stóran áhuga

Morten váttar, at umframt vanligu samarbeiðsavtaluna millum Nunaoil og donsku sjóverjuna, so er greitt, at tað eisini liggja nøkur djúpri áhugamál í hesum. Danski staturin er áhugaður í at styrkja leitingina eftir olju og gassi við Grønland.

Endamálið við samarbeiðsavtaluni millum Nunaoil og sjóverjuna er, at sjóverjan sum minstamark skal fáa sínar útreiðslur dekkaðar fyri tað arbeiði, sum verður gjørt fyri Nunaoil.

Ein av málsetningunum hjá danska statinum og donsku sjóverjuni er at vísa, at millitering eisini kann taka sær av sivilum uppgávum.

Nunaoil skuldi brúka ísstyrkt seismikkskip


Thetis var upprunaliga bygt sum sjóverjuskip. Tað varð latið sjóverjuni í 1991. Tá hevði danski staturin gjørt av, at hann vildi lata Nunaoil sleppa at brúka eitt av sjóverjuskipunum, tí Nunaoil kundi ikki finna nakað sivilt seismikkskip, sum varð fært fyri at arbeiða í teimum torføru ísviðurskiftunum, sum eru galdandi í Grønlandi.

Thetis varð tí umbygt til seismikkskip. Síðani hevur tað bæði rókt seismikkuppgávur og vaktartænastu.

Ætlanin er at kanningin, sum nú verður gjørd við Føroyar skal taka ein til tveir mánaðir.

Kanningin verður vestan fyri Suðuroynna. Talan er um eitt økið, sum er 2000 kilometrar stórt.

Linjurnar, sum skotnar verða, ganga frá økinum vestan fyri Suðuroynna og heilt til markið til hvíta økið.



Hetta eru nýggju "kanónirnar" hjá donsku sjóverjuni við Føroyar - luftkanónir til seismikk umborð á Thetis. Mynd jan